FINALA-2
**DYSTARSKRÁ 7 / 2023**

# H71

MIKUDAGUR
**10. APRÍL**




Mynd: Álvur Haraldsen

## FINALA 2

**MIKUDAGIN 10. APRÍL**
**KL. 19.30 MENN:**

# H71- Víf

sms
SUÐUROYAR SPARIKASSI
ARTICON
WENZEL.FO
BÓNUS
INTERSPORT Thomas Dam Ítróttur
BYGMA BALSLEV
TRYGD
ADVOKATFELAGIÐ


sms
ein bylingur í Havn
sms
EIN BYLINGUR
Í HAVN
© Jens Kr. Vang



ANNA DAM, FORKVINNA Í H71

# TAKK FYRI Í ÁR!

# GREIPAN

**Greipan sum kom til Hoyvíkar og svongdin eftir meira**

Leygardagin tann 6. mai 2023 var ein søguligur dagur, tí tá tryggjaðu okkara kvinnur sær greipuna við at vinna á Kyndli og harvið fáa annað FM heitið hjá H71 í bestu kvinnudeildini til Hoyvíkar.

Vit eru stolt og vælnøgd við kappingarárið hjá kvinnunum, men enn er tíðin ikki komin at leggja seg á liðina at njóta hetta, tí enn eru stór tøk sum skulu takast og vit eru svong eftir meira gulli.

Møguleikin at vinna greipuna hjá bæði kvinnum og monnum er framvegis tilstaðar og trúgvin á, at tað kann lata seg gera, er framvegis sterk í samkomuni H71 í Hoyvikshøllini.

Vit spæla mikudagin tann 9.5.2023 okkara seinasta ella næst seinasta heimadyst í ár.

Okkara menn vóru fyri tapi í fyrstu finaluni móti Víf og skulu nú til at vísa hvør dugur er í teimum í Hoyvik. Vinna vit, so er vist, at enn ein finala verður í Hoyvik tann 17/5 men tapa vit, so kann Víf gera arbeiðið liðugt á heimavølli tann 13/5.

Vit eru aftanfyri 1-0 men vit vita, at tá okkara menn hava ryggin móti múrinum, so kann nógv gott koma burturúr.

Vit í nevndini fara at nýta høvið at takka tykkum øllum, sum á ymsan hátt hava givið tykkara íkast til arbeiðið í felagnum hetta kappingarárið sum nú av álvara er farið at halla. Tit sum hava staðið vakt, turkað gólv, ansað kiosk, bakað, vaskað klæðir, tikið dystir upp á video, skipað fyri tiltøkum og hjálpt til við venjing og samskipan. Nógvir tímar eru lagdir í felagið og bert tí at vit eru nógv sum stútt og støðugt bera til felagsskapin, fáa vit ein vælvirkandi felagsskap sum H71 í Hoyvik. Einki kemur av ongum og vilja vit, at okkara børn og ungu skulu hava eitt gott frítíðarítriv, so mugu vit hvør í sínum lagi geva eitt íkast.

Hóast vit megna at framala hondbóltsleikarar sum stór feløg vilja hava til sín, mugu vit áhaldandi arbeiða við at hava breiddartilboðið so gott sum gjørligt. Hetta er avgerðandi fyri felagsskapin og samanhaldið í felagnum og trupult er á ungum árum at meta um, hvørjar framtíðar stjørnurnar eru, men øll kunnu vit njóta gott av felagsskapinum. Og sum ein klók kvinna einaferð segði:

“ Fólk, sum gera sjálvboðið arbeiði, eru tey mest eydnusomu “ – so haldið tykkum ikki aftur komandi ár.

Takk fyri í ár.

Anna Dam, forkvinna H71


WENZEL
FORD, VOLVO OG MAZDA Í FØROYUM
WENZEL.FO
Akranesgøta 5 · Tórshavn · tel. 35 45 00
WENZEL.FO
Ford


BANKNORDIK
Áhaldni gevur úrslit
Errin høvuðsstuðul hjá føroyskum hondbólti
Meira enn ein banki
effo
78
BANKNORDIK

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT



ADVOKATSKRIVSTOVAN
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Helga á Borg, adv.
Rósing Rasmussen, adv.
Kristoffur Kristoffersen, adv.ft.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO




ID.3. Býður tær vælkomnum.
Flytur teg inn í elheimin.
**Flytur teg frameftir.**

Les um prís, koyristrekki, umhvørvisroknskap og mangt annað á
**www.bilasolan.fo**

**Bilasølan**
**Vegurin Langi 43, 359700**




HELGI HOYDAL / TROK.FO

# TAÐ PERFEKTA KAPPINGARÁRIÐ

*Fyri fyrstu ferð í nýggjari tíð hava vit sæð eitt lið vunnið allar sínar dystir í landskappingini. Tað er púra óhoyrt. Klassa munur hevur verið ígjøgnum alt ár. Tær mistu eitt stig í grundspælinum og gjørdu reint borð í endaspælinum. Í steypakappingini tað sama, hóast Neistin vann við einum máli í einum dysti sum var avgjørdur. Vit kunnu ikki lata tað fara framvið, uttan at viðurkenna hvussu burturúr flott hetta bragdið er.*

Hjartaliga til lukku allar samlar, og til lukku øll í felagnum sum á onkran hátt eiga ein part í at vit hava eitt søguligt lið hjá kvinnum fyri fyrstu ferð. Tær hava vunnið alt sum vinnast kann í ár, undantikið EHF Cup kappingina, har úrslitið eisini er framúr flott.

Um vit hyggja at hagtølunum so kunnu vit lesa hví hetta er hent. Tað er við frástøðu tað besta álopið í kappingini í ár. Í grundspælinum skoraðu tær á leið 120 mál fleiri enn næsta lið á listanum. Upp á 21 dystir. Tær hava vunnið dystirnar við umleið tíggju málum í miðal. Tað er einki at ivast í at hetta liðið er eitt tað besta vit nakrantíð hava sæð í Føroyum.




Men tað er ikki tí vit hava ein ella tveir leikarar sum bera liðið. Vit eiga ikki eingongd toppskjúttan í deildini, hóast vit hava skorað nógv flest mál. Tað sigur sítt í sær sjálvum. Nú tá vit eru við toppskjúttar skal man ikki gloyma at rósa toppskjúttanum í deildini Turið Arge Samuelsen fyri at seta málmet við 279 málum í ár.

Aftur til H71. Lionsbikarið, steypakapping og landskapping, alt hava tær



vunnið. Hetta er eitt lið sum er ógvuliga væl samanspælt, sett saman av ungum evnaríkum leikarum á øllum plássum. Breiddin sæst eisini aftur í omanfyrinevnda. Vit eiga ikki toppskjúttarnar, men vit eiga liðið sum vinnur. Gaman í, Jana hevur skorað beint undir 200 mál, tað er ikki lítið. Og tá á stendur stendur altíð ein afturat, klár at geva sítt til at liðið vinnur. Við skaðum á fleiri berandi leikarum, hava tær hóast alt megnað at halda sama støði allan vegin.

Arsenalfjepparar tosa enn um tá lið teirra fór ósigrað ígjøgnum Premier League í 2003/04. Vit kunnu leita okkum íblástur hjá teimum, til at minnast til hvussu stórt hetta er. Tó rokni eg ikki við at vit skulu bíða 19 ár til næstu ferð okkara kvinnur vinna landskappingina aftur.

Fleiri leikarar leita sær nú aðrar avbjóðingar uttanlands, bæði sum hondbóltsleikarar og í lesnaði. Men er tað eitt sum er sikkurt, so er tað at kvinnuhondbóltsurin í Hoyvík veruliga er komin fyri at vera.

Enn eina ferð hjartaliga til lukku, og hátíðarhaldið hetta fyri tað sum tað er, eitt satt hondbóltsbragd av teimum allar størstu!













FOKUS
18:29
Lætt og stuttligt
Gjaldskort
Fígging
FramtíðarKonta
ss.fo
SUÐUROYAR SPARIKASSI




XL BYG. BORG
SNIÐ, GÓÐSKA OG HALDGOTT HANDVERK
DESIGNA KØKAR
BORG | RUNAVÍK | KLAKSVÍK | TÓRSHAVN | WWW.BORG.FO


© Jens Kr. Vang

ODDAGREIN

# KVINNURNAR FØROYAMEISTARAR

Leygardagin vunnu H71 kvinnur í fullari Hoyvíkshøll triðju og avgerandi finaluna í lanskappingini á Kyndli við tepra málmuninum 25 - 24 og var tað harvið veruleiki at kvinnurnar høvdu vunnið føroyameistaraheitið annað árið á rað. Samstundis varð staðfest, at H71 eisini er greipuvinnari á fyrsta sinni í søguni hjá kvinnuhondbólti í felagsins, hetta í og við at tær fyrr í ár vunnuð steypakappingina fyri kvinnur somuleiðis við finalusigri á Kyndli, tá við málmuninum 31 - 27. Fyri at tað ikki skal vera lygn, so var dagurin eisini ein “trible” - sigur fyri kvinnurnar hjá H71 havandi í huga, at tær eisini vunnu stórsteypadystin (Lionsbikarið) tá kappingarárið byrjaði, eisini í tí føri við sigri á Kyndli við heili 38 - 22.

Soleiðis gjørdu tær við hesum monnunum kunstin eftir, tá hesir í 2017 eisini vunnu “the trible”. Leggja vit so afturat at kvinnurnar eisini í ár vunnu seg víðari í tveimum umførum í EHF - steypakappingini við sigrum á ávikavíst eysturríkska liðnum SC Ferlach við samlaða málmuninum 59 - 43 og á tjekkiska liðinum Slavia Praha við samlaða málmuninum 56 - 53, ja so kann avrikið neyvan gerast størr,i og verður henda sigursrøð fyri eitt føroyskt hondbóltslið neyvan tikið í bræði. Í lands- og steypakappingini hava tær bert mist trý stig. Tær vunnu grundspælið við bert at missa eitt stig og við einum samlaðum málmuni á 234 mál, ið gevur ein gjøgnumskurðsmálmun fyri teir 20 vunnu dystirnar á heili 11 mál - klassi. So einki er at taka seg aftur í, at tær veruliga hava verið burturúr suvirenar. Spæl teirra hevur verið gott, bæði í álopi og verju, - ja til tíðir suplimt - men tað sum ein kanska einamest hevur verið hugtikin av, tað er tann ófatiligi stríðsvilji, ið hevur ligið í hvørjum leikara, ja tær hava av innasta huga ynskt at vinna hvønn dyst og hvønn leik í dystunum. Ikki hevur bert verið viðrák, minni enn so, men hóast karmarnir vóru nakað ótryggir eini løtuna fram ímóti jólum í fjør, so lótu leikararnir seg á ongan hátt nerva av hesum á leikvøllum, líkamikið um leikt varð í Føroyum ella úti í heimi.
Venda vit aftur til triðju og avgerandi finaluna landskappingini, leikt varð í Hoyvíkshøllini leygardagin, so stóð einki til tað einu løtuna í fyrra hálvleiki í dystinum. Dysturin var byrjaður nøkunlunda javnt, har báðar verjurnar stóðu seg væl, men eftir at 5 minuttir vóru leiktir av fyrra hálvleiki, tóku kyndilsgentur dik á seg, og eftir lítlari løtu vóru tær á odda við heili 15 - 7 væl leiddar av oddvitanum Turið Arge Samuelsen, ið hevur verið ein einmansherður fyri Kyndil hetta leikár. Men í hesi støðu prógvaðu hoyvíkskvinnur enn einaferð hvør stiril er í teimum. So eftir at hava umskipað seg nakað og við at mansverja Turið Arge Samuelsen tóku hoyvíksgentur seg inn aftur á Kyndil og uml. 10 minuttir inn í annan hálvleik kundi H71 leggja seg á odda 18 - 17. Restina av dystinum leikaði javnt á og var tað fyrst í evstu løtu at H71 fekk tryggjað sær sigurin við einum máli omaná. Ein sera spennnandi og nervpirrandi løta, ið sjálvsagt gjørdi sigurin enn søtari tá av var tornað og sigurin var í hús.
Men neyðugt verður skjótt at fáa armarnar niður aftur og smoyggja uppum ermar aftur til komandi kappingarár. Stórsti parturin av bulinum av hesum liði fer nevniliga av landinum og kemur soleiðis ikki at leika fyri H71 komandi ár. Soleiðis fara bæði Jana Mittún og Maria Hallsdóttir Weyhe, ið kanska hava verið týdningarmestu leikararnir á liðinum niður til Danmarkar, Maria í lestrarørindum og Jana fyri at leika við fremsta liðinum hjá Viborg í hondbólti. Eisini fara verjukempurna tvíburðarnir Lív og Vár Bentsdóttir Zachariassen niður at lesa, umframt Marita Mortensen. Men sum kunnugt kemur maður í mans stað, eisini í kvinnuhondbólti. Sett verður væl skikkað venjaratoymi at standa fyri nýggja kvinnuliðinum og stórur er hópurin av ungum og evnaríkum leikarum í samlaða hópinum hjá H71 kvinnum, ið verður eftir á klettunum, so helst spyrst okkurt gott burturúr tá vit tørna til aftur til heystar.
H71 faldarin vil við hesum takka teimum á kvinnuliðinum, sum hava valt aðrar leiðir komandi kappingarár, fyri tað stóra arbeiði tær hava gjørt fyri barndómsfelag sítt. Allar hava tær verið við at bróta upp úr nýggjum og við hugagóðum arbeiði verið avgerandi partur í arbeiðinum við at menna elitukvinnuhondbóltin hjá H71 úr ongum uppá hægastu hondbóltstindar, bæði her heima og úti í heimi.




fk







Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98
www.weihe.fo | weihe@weihe.fo



1 Rúna Jógvansdóttir Larsen
2 Elsa Egholm
4 Brynhild Pálsdóttir
5 Vár Bentsdóttir Zachariasen
6 Bjørk Brimnes
7 Maria Halsdóttir Weyhe
8 Karin Egholm
9 Marita Mortensen
11 Lukka Arge
12 Alda av Skarði
13 Inga Maria Joensen
14 Sunniva Bogadóttir
15 Christina Turiðardóttir Arge
17 Lív Bentsdóttir Zachariasen
25 Sára Jacobsen
27 Anna Elisabeth Halsdóttir Weyhe
29 Poula Fríðheim Petersen
77 Jana Mittún
99 Guðrið Bogadóttir á Borg

**Venjari:** Simon Olsen
**Hjálparvenjari:** Djóni Gaard Joensen
**Liðleiðari:** Beinta Lindberg Hansen
**Málmansvenjari:** Jens á Skipagøtu
**Fysiskur venjari:** Heri Ziska
**Fysioterapeut:** Sebastian Christiansen / Ingilín Holm

sms





1 Torstein Sivertsen
2 Sveinur Olafsson
5 Rói Seyer Hjaltason
7 Baldur Gillason
8 Tórmóður Petursson Djurhuus
9 Jón Rói Mohr Høgnesen
10 John Skaalum Vilhelm
15 Ragnar Karlsson
18 Sakir Tróndarson Frýdal
21 Høgni Højsted
28 Rói Ellefsen á Skipagøtu
31 Rói Heinason Thomsen
39 Rókur Ziskason
45 Peter Krogh
71 Bogi Hansen

**Venjari:** Simon Olsen
**Hjalparvenjari:** Djóni Gaard Joensen
**Málmansvenjari:** Ári Dam
**Mentalvenjari:** Jens á Skipagøtu
**Fysiskur venjari:** Heri Ziska
**Fysioterapeut:** Sebastian Christiansen
**Liðleiðari:** Petur O.Sivertsen / Hanus Mortensen

BURN
FITNESS



# HEILSAN FRÁ PETER KROGH

Jeg vil selvfølgelig starte med at det her er ikke et farvel, men et på gensyn.

Af hjertet tak til H71 familien for at give mig de bedste år på Færøerne. 8 år blev det til, og det har været de bedste 8 år i mit liv.
Tak for at i har taget så godt imod mig og vist mig støtte i medgang og modgang.

Det har været fedt at være en del af et helt unikt fællesskab i H71, og savnet til klubben, fællesskabet og menneskerne omkring klubben vil blive stort.

Selv om jeg kommer til at spille i Danmark i den kommende sæson, vil mit hjerte stadig være i H71. Og jeg vil følge med i den udvikling, som heletiden sker i H71.

Tak for nu og vi ses inden længe.

Peter Krogh






















# TAKK FYRI TÍÐINA PETER KROGH :-)

»GOTT ER AT HAVA
GÓÐAN Í RÁÐUM«



ADVOKATFELAGIÐ

LUKAS DEBESARGØTA 8 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

PETUR EVEN DJURHUUS · JÓGVAN E. ELLEFSEN
INGI HØJGAARD · GUNN ELLEFSEN




ANGUS
STEAKHOUSE
Kom og
royn okkara
BBQ
Spare Ribs
Bílegg borð á
angus.fo


Vit hava altíð ein
BIL TIL TÍN
WAAG


Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo
TÍTT FLUTNINGSFELAG
SAMSKIP



VIT GERA ALT
BLIKK- OG
RØRARBEIÐI

*Alt til* *HITA*
*SANITET &*
*VENTILATIÓN*

**Maria Poulsen & Co**

Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000




HJÁ **FRÓÐA**

SMYRILSVEGUR 10
TÓRSHAVN

**FAROE SHIP**


Mynd: Gudmund Helmsdal
LAIDERZ
Fokus på sportsfaciliteter
HOYVIKSVØLLURIN
Fyrsti FIFA QUALETY PRO
góðkendur vøllur í Føroyum.
JUTA MASTER 40/200 á EL25
www.laiderz.dk


SPEKT kann hjálpa tær við
Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum
skatti
Afturrindan
av mvg
Eftirlønum
SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo
SPEKT
løggildir
grannskoðarar


OKKARA KJARNUØKI
GRANNSKOÐAN
ROKNSKAPARHJÁLP
SKATTUR
VIRKISRÁÐGEVING
BÓKHALD
MEIRVIRÐISGJALD
Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.
Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI
WWW.JANUAR.FO


Tak appina
niður her
Fyll á og
koyr víðari
effo
appin




HOTEL BRANDAN



ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo




Thomas Dam Intersport
Bøgøta 1, Klaksvík
455320

Thomas Dam Intersport
Jónas Broncksgøta 21, Tórshavn
355300

Thomas Dam Intersport
Glyvravegur 38, Glyvrar
447399




Niels Finsensgøta 5, 100, Tórshavn, 355310
@theathletesfoottorshavn


Et her, tak við ella bílegg
mál
Máltíð til børn & vaksin
Salatbarr Kaffi Tvíflísar
Smurd rundstykkir
Salatkort
mál
10 Miðal salatir
350,-
Spar 50 kr
Karlamagnusarbreyt 16A, Hoyvík, tel. 588256


SMYRIL LINE
EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC
Frítíðin byrjar umborð
WWW.SMYRIL-LINE.COM
Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.
Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.
Les meira á www.smyrilline.fo, skriva til booking@smyrilline.fo ella ring 345900

NORÐOYA SPARIKASSI

Lán til bústaðin

Tosa við okkum um fígging



Heimlán
Bústaðarlán
Realkredittlán
Byggikreditt
Orkulán

Norðoya Sparikassi Hoyvíksvegur 67 FO-100 Tórshavn Tel. 475000 ns@ns.fo ns.fo

FISHFACTS

www.fishfacts.com

REYNI SERVICE P/F

Umhvørvisviðurkent
ISO 14001 virki

Tórshavn: Vegurin Langi 41, Hoyvík, Tel 35 30 40
Klaksvík: Klingrugarður 3, Tel 47 30 40

HIDDENFJORD

RAISED IN THE WILD




hiddenfjord.com




